

# HAVNAR KLUBBI 175 ár

# Frá elstu døgum
# HAVNAR KLUBBA

Árið 1974 er eitt merkisár í søgu Havnar Klubba: Klubbin hevur 175 ár á baki, stovnaður sum hann var í oktober 1799. Sjálvur stovningardagurin er eftir sum menn hava funnið fram til 27. oktober 1799 — ella rættari at siga, sum maður hevur funnið fram til. Tað var klubbalimurin gjøgnum mong ár, og seinastu árini hann livdi eisini heiðurslimur í Havnar Klubba, Einar Mohr, sáli, sum aftan á gjølla gransking á Kgl. bókasavninum í København í 1958 kom fram á nakrar veitslusangir, »Sange for Thorshavns Klub på Færøe«, sum vóru dagsettir til oktober 1799 og soleiðis prógva aldur Klubbans. Sagt verður í skjølunum, at hesir sangir vóru »synget i Klubben den 27. October 1799 ved Selskabets første Møde i Hr. Erichsens Hus«, og verður hesin dagur roknaður sum stovningardagur Klubbans.

Einar Mohr gav aftaná granskingar sínar í København nevndini í Havnar Klubba eina gjølla og sera áhugaverda frágreiðing um Klubban gjøgnum tíðina, eina helst ta eldru tíðina, og skulu her verða uppafturtikin brot úr hesi frágreiðing, frá 1959, tá ið Klubbin var 160 ár:

»Tíðum hevur verið havt á máli, hvussu mong ár klubbin mundi hava á baki.

Eisini hevur verið framhildið, at klubbin stav-aði aftur í ta tíðina, tá Rybergs handil hevði sínar goymslur og virkir í Vágsbotni í 1770unum og 1780unum, og bendir mangt á, at grein er í hesum máli. Hetta var ein reiðiliga stór fyritøka við 40-50 komandi og farandi skipum árliga. Stórur partur av starvsfólkunum á landi vóru bretar, sum húsa-og staðarnøvnini Quilling, Gilbert og Guinea-brúgvin enn minna okkum um.

Tað skulu bert fáir bretar vera saman, til teir stovna ein klubba, verður sagt, og týðir mangt uppá — og er illa hugsandi annað — enn at eisini hesir bretar saman við manningunum ella yvirmonnunum á skipum teirra hava havt klubba her, og at somuleiðis onkrir havnarmenn eisini gjørdust limir er eyðvitað.

Tey framíhjá-handilsrættindi, henda fyritøkan hevði, gingu út í 1788, tá hon gav uppat, men hesir havnarmenn høvdu tá fingið kunnleika ella kennskap til tann týdning og virði — um ein so kann siga —, sum ein klubbi kann hava, og við hesi fyrimynd stovnaðu teir so »Thorshavns Klub« eini 10 ár seinni; uttan henda kunnleika var hann væl neyvan komin í lag.

Í Danmark var í byrjanini av 1800-talinum ein kendur klubbi í København. Hann kallaðist »Dreyers Klub«, har mangar av tátíðar ands-hetjum hittust — tað var í tí sokallaðu gulløldini har.

Her í Havn var »Thorshavn Klub« stovnaður tann 27. oktober 1799. Navnið var fyri 20-30 árum síðan broytt til »Havnar Klubbi«.

Hóast áðurnevndu fyrimynd, sum havnarmenn høvdu frá Rosenmeyers og Flors døgum, má ein undrast á, at her, tá Havnin taldi so fá



*Mynd frá Kongabrúnni seinast í 80'unum: við vissu kann ikki verða sagt, at Klubbin hevur átt innivist í »Sailors Home« (har Evensens hús seinni vórðu reist), men tað er líkt til, av tí at Klubbin, áðrenn hann fekk egin hús, hevði rúm í leigaðum hølum ymsastaðir*

fólk, vóru líkindi til trivni av einum klubba, men ein kann samstundis leggja til merkis, at nettupp um hetta mundið vóru í mun til íbúgvaratalið mong týðandi og mentað fólk í Havnini, sum hava verið før fyri hesum, og eyðvitað hava tey somuleiðis sett sín dám á henda fámenta bý og ávirkað íbúgvarnar bæði í siði og eisini mentunarliga.

Soleiðis livdi tá her ein maður, nevndur Claus Jakobsen Lund. Hann var literatur, fekst við bóklig arbeiðir, og er tað hesum manni at takka, at vit vita stovningardag Havnar Klubba.

Hann var føddur í Havn 9.6.1739 og doyði her 11.10.1815.

Chr. Heilskov, sum frágreiðingin omanfyri er eftir, skrivar, at Claus Lund var frísintur og dámligur maður, sum tosaði »Folkets Sag«, at hann var yrkjari, fyriuttan at hann umsetti ymisk rit úr týskum og enskum. Tær av hansara yrkingum, sum skulu nevnast her, og sum hava týdning fyri Havnar Klubba, eru hansara vísur: »Sange for Thorshavns Klub paa Færø forfattede ved adskillige Lejligheder«, prentaðar í Kø-benhavn í 1803. Sangirnir eru 9 í tali og stendur undir tí fyrsta: »Synget ved Selskabets første Møde 27. October 1799 i Erichsens Hus«. Det kgl. Bibliotek í København hevur eitt eintak av hesum vísum, hugsandi einasta sum til er, og hevur Havnar Klubbi fotokopiir av teimum.

Hann giftist 1797, men doyði barnleysur.

Tað mentunarliga lívið í Havn helt fram í tí eftirfylgjandi tíðini — sum dømi kann bert nevnast, at longu í 1828 var bókasavnið sett á stovn, og eyðvitað ella væl hugsandi er, at við framførslum av sjónleikum, fyrilestrum, veitslum o. t. hevur klubbin verið miðdepulin, og hevur hetta kanska verið orsøkin til, at rithøvundin av skaldsøguni »Glámlýsi«, hvørs hendingar fara fram á døgum Niels Winthers í 1840, letur politiskt tjak hava verið í klubbanum kvøldini undan einum ávísum tilburði í bókini.

Hvar klubbin hevur havt til húsa og hvar tað í fyrsta sangi Carl Lunds nevnda »Erichsens Hus« er, man vera ilt at siga, tó skrivar Dione Isaksen, Djóni í Geil, í einum av sínum »Gamlar myndir«, har hann nevnir ymisk gomul húsanøvn í Havnini, at eitt stað var nevnt »Uppi í Klubba«, tað sama sum eisini er nevnt »Quillingsgarður«. Um hetta staðarnavnið »Uppi í Klubba«, sum nú er burturdottið, hevur sín uppruna av, at klubbin hevur havt til húsa har, kann sjálvandi hvør hava sína hugsan um.

Sum Havnin við tíðini vaks og limatalið harvið hevur økst — kanska hevur eisini verið trupult at fáa hóskandi høli — gjørdist neyðugt at fáa egið hús. — Í hesum máli var tann vælumtókti lærarin við realskúlan, Oliver Effersøe, ein av teimum ídnastu undangongumonnunum. — Tann 1. oktober 1882 varð tað nýggja klubbhúsið vígt, og til veitslu, ið hildin varð henda dag, yrkti konsul Hansen úti í Havn eina vísu,



*Mynd frá seinastu øld, ið vísir táverandi klubbahúsin á Tingbúsveg (fremst frá vinstru)*




*Havnar Klubbi ár 1908, tá ovara hæddi var komin aftrat*

sum enn er til skjals í savni klubbans av veitslusongum.

Nakað um somu tíð man »keglubanin« eisini vera bygdur, og varð hann nógv nýttur alla ta tíð, hann var í standi, við tað at ikki-limir somuleiðis kundu fáa hann til brúks móti eini lítlari avgift av hvørjum »potti«.

I árinum 1892 varð eitt sjónleikarfelag stovnað, »Den dramatiske Forening i Thorshavn«, við tí endamáli at framføra sjónleikir o. a. Fyri at koma hesum felagi ámøti læt klubbin byggja uppískoyti til klubban norðureftir til »teatursal«. Um hetta skrivar Chr. Holm-Isaksen í »Varðanum« soleiðis:

»Klubbin hevði bygt, men felagið pliktaði seg til í fimm ár at svara so mikla leigu, sum kravdist til rentur og avdrag av byggingini. Stýrisnevndin fyri nýggja sjónleikarfelagið vóru: sorinskrivari Andersen, Rasmus Effersøe, Meinh. Jacobsen, Georg Long og lærari Christian Ludvig Johannsen (seinni Jacob Lútzen keypmaður). Nýársdag 1893 varð sjónleikarsalurin latin uppí felagsins hendur, og 28. januar varð hann vígdur við inngangsorðum av Emil Bruun presti, sjónleikinum »Magnus«, fólkalívsbílæti í 3 pørtum av R. C. Effersøe og »Fastelavnsgildet« av Erik Bøgh. Hetta var góð byrjan. . . .«

Søga klubbans var komin fram til næsta árhundraðskiftið, til ta tíð, sum fyi eldri klubblimir kann kallast »okkara tíð«.

At klubbin hevði fingið egið hús veldi sum vera man stóra framgongd, og klubblívið treivst sum ongantíð fyrr.

Soleiðis var tey 20-25 fyrstu árini av hesari øld, og fíggjarliga mentist klubbin stórliga, so longu í 1908 var húsið bygt størri við einari hædd afturat í allari húsalongdini, og fekk klubbin hervið tann vakra bygning, sum síðan hevur verið eitt prýði fyri Havnina. Eisini frá hesari veitslu, ið hildin var, tá bygningurin var liðugur, er songur til skjals.

Nevnt kann vera, at Chr. Holm-Isaksen í 1915 var biðin um at prýðka salirnar. Hetta varð gjørt við málningum av føroyskum landsløgum málaðir beinleiðis á allar veggirnar uppi undir loftinum í tí minna salinum. Hesir fórust heilt illa við eldsbrunan í 1940, meðan málningarnir úr sjónleikum Holbergs enn eru til.

Stórfingnar veitslur vórðu hildnar hasi árini og karneval hvørt skotár.

Musikkurin til veitslurnar varð leikaður av einum streingjaensemble undir leiðslu av tí kenda musikklærara Georg Hansen. Hann og O. J. Hansen violin, brøðurnir Viðstein violin, bratsch og cello, og byrjað var altíð til tær stóru veitslurnar við einari polonaise, men sum tað stendur í einum av Lunds songum: »Strengeleg veksled med Kæmpekvad«, og verður nú eins og tá altíð farið upp á gólv til eitt hvørt kvæði ella vísu.

Til karnevalini vóru gjørdar stórar fyrireikingar. Eitt dømi: Dansisalurin gjørdur um til eina neapolitanska gøtu ella gøtustubba, har



*Elsta barrin, ið mynd er til av*

allur endaveggurin vísti Neapelgolfin við Vesuv, á breiðvegginum ein fontaina, har vatn rann úr einum listarliga gjørdum skorti, hinumegin hurð og vindeyga úr inngongdind í romanskum ella suðurlendskum stíli, og frá hinum endavegginum varð bygd eitt sindur inn í salin ein balkon ella balustrada, nakað upp frá gólvinum. Rúmini uppi á vóru eisind umgjørd við listarligum hegni. Á okkara døgum hevði alt hetta ella tílíkt ikki kunnað gjørst uttan stóran kostnað.

í hesum sambandi kann vera nevnt sumt av tí, sum klubbhúsið hevur verið nýtt til.

í sínari tíð var vanligt á stórum hátíðardøgum, t. d. á ólavsøku, at hava almennan føroyskan dans uttan atgongugjald fyri luttakandi. Tá umfarssjúka, skarlaksfepur, gekk í Havnini seinast í 20-unum, varð húsið latið til epidemihús, har o. u. 40 kvinnur, menn og børn vóru internerað í 6 vikur. Sum vælegnaður til veitsluhald hevur mangt brúðarparið hildið teirra brúdleyp í klubbanum, eins og hann hevur verið útleigaður til mangar aðrar veitslur og samkomur, og er tað siður hvørji jól at hava jólatræ fyri børnum annan jóladag.

Á hvørjum sumri hevur klubbin vanliga útferð. í blaði er at lesa, at klubbin í 1901 gjørdi útferð heilt til Norðuroyggjar við »Smiril«, sum hann hevði leigað.

Inntil Sjónleikarhúsið varð bygt í 1925, var tað í sjónleikarsali klubbans, fólk komu til sjónleikir, koncertir, fyrilestrar, fundir o. s. fr., og hava mong týðandi uttanlanda nøvn verið á pallinum her. Seinni hevur klubbin fingið biografloyvi, hvørs drift hevur verið fíggjarligur stuðul.«

Einar Mohr endaði frágreiðing sína við at vísa til, at Klubbin hevði tann heiður at hava fyrst Frederik VIII sum heiðurslim, síðani kongshjúnini Christian X og Alexandrine, drotning, og Frederik IX og Ingrid, drotning.



*"Kongasalurin" í gamla Klubba verður framvegis nýttur*

# Klubbin gjøgnum 175 ár

Í hesum 175. stovningarári Havnar Klubba kann orsøk vera til at líta aftur um bak — mong minni og mangar hendingar knýta seg at Havnar Klubba frá fyrstu tíðini fram til dagin í dag. Kortini ber ikki til í einum stuttum veitsluriti at tríva í alt tað, ið hevur havt ávirkan á klubbalívið í síni heild, ár undan ári. Heldur er ikki ætlanin at fara undir eina slíka roynd, men í stubbum at lýsa brot úr klubbasøguni, taka fram okkurt, sum kann lýsa mannagongdina og einstakar hendingar, ið fram um tær meiri vanligu hava eyðkent virkið, sum gjøgnum skiftandi tíðir er avrikað innan Havnar Klubba.

Ein tilík lýsing kann ikki vera fullfíggjað, einahelst tí at keldutilfarið ikki er so rúgvismikið, sum ynskjandi kundi verið. Orsøkin er í fyrstu syftu, at elstu gerðabøkur Klubbans ikki longur eru til. Og helst hevur í fyrstu árunum lítið og einki verið gjørt burtur úr at festa uppá blað serstakar hendingar, ið kundu verið av áhuga hjá klubbalimum nú á døgum at frætta um. Harmuligt er, at bøkur og skriv frá 1800-talinum eru horvin, helst aftaná eldin, ið herjaði Klubban í 1940, tá ið ensku heryvirmenninir eina tíð høvdu tikið Klubban; hesin eldur herjaði 28. juni hetta ár, og ovara hæddin í Klubbanum fór rættiliga illa, meðan afturfyri niðaru hæddirnar sluppu undan og vóru at kalla óskalaðar. Men sum nevnt, tað er ikki at ivast í, at virðismikil skjøl hjá Klubbanum fóru fyri skeyti tá.

Men alt er tíbetur ikki farið, og við at granska tað tilfar, ið til er, fæst tó nakað sum sigur okkum eitt og annað um farnu tíðina í Havnar Klubba. Elsta gerðabókin er frá 1871, og greiðir hon mest frá lógfestum aðalfundum og frá nevndarfundum, men synd er at siga, at teir vóru orðaríkir, ið skrivaðu hesar gerðabøkur. Tað var »stutt og koncist«, sum teir skiítandi orðstýrarnir settu upp á blað í gerðabókunum fram til aldarskiftið. Men afturfyri eru forvitnislig skjøl til, ið lýsa tíðarskeiðið frá fyrst í 1870-unum fram til um ár 1900. Hesi vóru m. a. »Fortegnelse over Klubbens Inventarium i 1892«, rokningar og annað tilíkt, ið vísa munin millum tá og nú, ikki minst hvat ið prísunum viðvíkur!

Tað kann vera vert at tríva í nøkur dømi: »Fortegnelse over Klubbens Inventarium« í 1892 t.d. vísir, at teir, ið stílaðu fyri tá á døgum, hava verið ógvuliga ansnir at gera eina so nágreiniliga og samvitskufulla uppstilling, sum teir vóru førir fyri. Ikki alt á listanum skal verða reksað upp, men vit fáa at vita, at Klubbin hetta ár átti m. a. »4 St. Sophaer, 8 Borde, 20 Stole, 1 Bogskab, 3 speile, 6 Skilderier, 10 Spyttebakker, 1 Uhr, 1 Petroleumskoger, 1 Fjer-kost, 1 Cigarklipper, Kongens Buste, 7 Aske-bægre, 1 Billard med 22 smaa Baller, 9 store do og 8 Køer med Stativ«.

Harumframt — gerðabøkurnar vóru fyrstu 120-130 árini skrivaðar á donskum — vóru í »Klubbens Inventarium«: »1 Vandkaraffel, 22 Ølglas, store, 12 Stk. mindre, 22 Vinglas, 2 Sta-



tiver til at hænge Tøj paa, 2 Haandklæder, 1 Blækhus, 1 Bordklokke, 1 elektrisk Ringeapparat. . . .«

Klubbin hevði um tað mundið og heilt fram til fyrst í 1920unum loyvi at selja og skeinkja sterkt, men meðan hann í 1892 átti 22 víngløs, vóru snapsagløsini bert 6 í tali eftir hesum sama lista! Og ikki tí: »Beholdning over Beværtnings-gjenstande i Thorshavns Klub den 31. December 1892« vísa, at goymslan umfataði m. a.:
»28 Fl. Muskatvin, 49,00 Kr., 13 pæle Sherry, 22,75 Kr., 6 Fl. Whisky, 15,00 Kr., 21/2 Fl. Champagne, 57,75 Kr., 2/2 Tdr. Øl, 50,00 Kr., 7 Fl. Akvavit, 8,40 Kr., 2 Fl. Rødvin, 2,50 Kr. . . . .« o.s.fr. Eisini fáa vit at vita, at á goymslu vóru 2 eskjur av sardinum til 2,20 kr., 1 tunna av koli, 4,00 kr., sigarir (684 stk.) fyri 54,72 kr. og petroleum fyri 0,72 kr. (!). Tilsamans á goymslu í peningavirði fyri 632,67 kr. Hetta var sum nevnt í 1892 — ódýrar tíðir og sparnir menn!

Nakrar rokningar frá árinum 1900 vísa, at heldur ikki tá varð kravt nógv fyri vøru og arbeiði:
»Til Thorshavns Klubs Theater, fra Elieser Arge, Uhrmager. An: Næseklemmestel, Nikkel, 2,00 Kr., Lorgnetsnor, 0,35 Kr., Strømper, 1,00 Kr., Brillestel 0,25 Kr. Betalt, 3,60 Kr., Elieser Arge«.
Ella henda rokningin frá sama ári: »Fra J. Egholm, Thorshavn: Reparation af et Par Støvler, 0,75 Kr.« Kassameistarin, ið tá var, Gunnar Winther, hevur hesa viðmerking til rokningina:
»Foranstaaende Beløb fremkommer ved, at jeg har ladet et Par Støvler, som tiilhørte Ingeniør O. Jacobsen, og som jeg brugte ved Komedien paa Thorshavns Klub Theater i Maj Maaned, oppudse. Tillige har jeg udlagt for Afsendelse af Støvlerne og Porto, 34 Øre, hvilket Beløb til-sammen med forannævnte = 1 Kr. 09 Øre, jeg forventer mig udbetalt af Thorshavns Klubs Kasse«. Peningurin varð goldin. . . .
Rokning frá H. N. Jacobsens bókahandil til Klubbens Teater: »800 Stk. Billetter, 4,40 Kr., 1 Stk. Ring, 0,85 Kr., Knappenaale 0,10 Kr., ialt 5,35 Kr.«
»Teatrið« hevði mangar tílíkar smárokningar til sjónleikir sínar, t. d. eina frá Sam Olsen uppá 10,02 kr. fyri »Lim, Zinkhvidt, Gardinringe (60 Stk. á 0,01 øre), Pensler, Stearinlys« o. a.
Fyri uppsetan av leiktjaldi kvittar J. Jacobsen Baja fyri 15 kr., og fyri niðurtøku 7,20 kr. í juli 1900, meðan Restorffs bakarí fær útgoldið 4,90 kr. fyri m. a. 60 køkur, breyð og makrónkonfekt. At seta ein rút í kostaði heldur ikki alla verðina tá í tíðini: Jacob Chr. Mørkøre fær 25 oyru fyri »en Rude sat i«.
Kvinnuligur vertur var um aldarskiftið, Ellen

Poulsen, sum fyri árið 1899 fekk 216 kr., og sum eisini tappaði øl fyri Klubban: »For Aftapning af 28 Tønder Øl for Thorshavns Klub har jeg af Kassereren modtaget 1 Kr. pr. Tønde, 28 Kr., hvorfor kvitteres«.

At reinska eina kamin varð goldið kommununi 50 oyru fyri. Heldur ikki haldaragjaldið fyri avísir var astronomisk: Dimmalætting fyri ein ársfjórðing kostaði 1 krónu. Sum kassameistari fyri Klubban fekk M. A. Winther eina ársløn, ið var 50 krónur, og Adolf Rubeksen tók 4 krónur fyri at leggja nýggjan dúk á billardið. »Eftersyn af en Vandhane« skuldi Tórshavnar kommuna hava 25 oyru fyri, sum Elieser Jacobsen lýsti kvittan fyri. At taka farm við s/s »Laura« hjá D.F.D.S. kostaði Klubbanum 2 kr. og 25 oyru — tað kann ikki hava verið hin heilt stóra »sendingin«.

»Fabriken Alliance« í Kjøbenhavn lat 24. apríl ár 1900 300/2 fløskur av eksportøli fyri 9,5 oyru hálvfløskuna, tilsamans 28,50 kr., tað vóru siðiligir menn, ið málbóru seg høviskliga, tá ið rokning varð send: »Vi anbefaler os fremdeles og tegner os med særdeles Agtelse: Fabriken Alliance«.

Tað munnu vera nakrar fløskur av øli tilsamans, ið fluttar eru tvørtur um Atlantshav hesi 175 árini. Men teir, ið stílaðu fyri í árinum 1913, munnu hava hildið, at okkurt hevur verið galið við ið hvussu er einari Tuborgfløsku, sum fann leiðina fram innan klubbagátt. Nevndin sendi aftur til Tuborg Fabriker í Hellerup fløsku við innihaldi, sum skuldi prógva, at »something rotten« var við bjórinum! Men á Tuborg vildu teir ikki ganga undir at hava selt Klubbanum vánaslag, hvat ið soljóðandi svarskriv frá 12. august 1913 lýsir:

*Thorshavns Klub,*
*Thorshavn, Færøerne.*

*»Efter at have modtaget den i Deres Ærede af Iste ds. omskrevne Flaske, har vi nøje undersøgt Indholdet paa vort Laboratorium; det viste sig at være Alun. Som De vil vide, er dette Stof meget let opløseligt, og, dersom det havde været til Stede i Flasken, da denne udgik herfra med Øl, vilde det have været opløst og følgelig ganske have ødelagt Øllets Smag. Det er derfor givet, at der ikke foreligger nogen Fejl fra vor Side, men at det nævnte kemiske Stof paa en eller anden Maade maa have fundet Vej til det Glas, hvori Øllet har været serveret; en eller anden har moret sig med at putte det i Flasken ved Serveringen.*

*Forøvrigt findes Alun slet ikke paa vort Bryggeri, saa alene af den Grund er det umuligt, at dette Stof hos os kan have fundet Vej til Flasken.*

*For at De kan overbevise Dem om, at det har været Alun, der var i Flasken, sender vi Dem samtidig hermed Flaskens Indhold pr. Post. — Med megen Agtelse . . .«*

— Fremmandaorðabókin sigur um alún: »Alu-miniums-salt, der bruges ved garvning m. m.«
Seinni er einki frætt um, at klubbalimir hava verið fyri teirri vanlagnu at verða »alún-garvaðir«, annaðhvørt av bryggjumanna-ella skálka-ávum. ...
.

Vit leita longur aftur í klubbatíðina — til oktober 1882,tá ið núverandi klubbahúsini á Tinghúsveg vórðu tikin í brúk. Frammanundan høvdu klubbalimir noyðst at húsast í leigaðum hølum ymsastaðni íbýnum. Frá vígsluni sunnudagin 1. oktober 1882 er veitslusangur, eftir A. V. Hansen (konslinum), har seinasta ørindi ljóðar:

*»Vort Maal er og med Tale klog*
*at vække Aand og Tanke,*
*at ikke vi, som nogle Drog,*
*skal gaa omkring og »janke«;*
*vi herfor alle virke vil,*
*hver efter bedste Evne,*
*det maa vi »mægge Lirke til« *)*
*skal Thorshavns Klub ej revne!*

*)En omskrivning af "lægge mærke til"

Klubbalimir vóru væl foreintir við nýggju húsini — kundu eisini av røttum vera tað, tí »Klubbin« mundi tá í tíðini vera av stásiligastu og prýðiligastu húsum í Havnini, eins lítið og nýggju húsini skemma býin í dag, tvørturímóti

Lógir Klubbans finnast so langt aftur sum til 1870-80 í prentaðum líki. Tær siga í fyrstu grein — prentaðar við gotiskari skrivt, ið varð nýtt á teimum føroysku prentsmiðjunum tá í tíðini — at »Klubbens Formaal er at være Organ for Selskabelighed og Discussion«. Lógirnar hava verið broyttar fleiri ferðir fylgjandi árini, og fyrsta grein í »Love for Thorshavns Klub« frá 1918 ljóðar nú: »Klubbens Formaal er at udvikle og styrke Samfundslivet ved Sammenkomster og selskabelige Adspredelser«. Hetta at »styrke Samfundslivet« sýnir, at klubbalimir hava ikki hildið heilt einki um felagsskap teirra. Klubbaskipanin, sum hon ljóðar í dag, sigur í 1. grein, at »Endamál Klubbans er at hugna felagslimunum við samkomum og veitslum« — og tað man neyvan heldur vera av leið.
— Hvør ið var klubbalimur í 1896! Tá var ársgjaldið 6 — seks krónur — fyri innanbíggjalimir og 2 kr. fyri uttanbíggja. . .
.
Av tí sterka slagnum var nóg mikið til í Klubbanum í »gomlu tíðini« — og fyri alt tað heilt fram til fyrst í tjúgunum, tá ið limir kundu keypa í barrini. Men serrættindi klubbamanna



*Barrin í gamla Klubba, har »fimmarnir« halda til.*

fingu ein bráðan enda. Aftaná sakarmál við hitt almenna fekk Klubbin bót, 1100 krónur, fyri at skeinkja fyri limum sínum móti peningagjaldi, og frá 1923 var brennivínssølan ein saga blott. Tá ið Klubbin nøkur ár herfyri fekk boxirnar var stórur partur av goymsluni úr barrskápinum
fluttur í hesar boxir. Hetta boxsystem hugtók danskan blaðmann, sum vitjaði í Føroyum um hetta sama mundið. Hann skrivaði í blaði sínum (Information) fyrst um teir gomlu stólar úr Dagmarteatrinum, ið Havnar Bio ognaði sær á sinni, og síðani: ».... i samme bygning findes klubben; her mødes Thorshavns high society, og her er der mulighed for at drikke spiritus — men kun hvis man er i besiddelse af en aflåset box, der kan rumme ens privat importerede drikkevarer. . . .«
Heilt á beinari leið var maðurin ikki, enn sum áður ber til at fáa sær upp í steypið eisini aðrastaðir í Klubbanum av »ens egne privat importerede drikkevarer«, um ein ikki er box-maður.
— Seinasta »skotið á stammuni« gjørdist nøkur fá ár herfyri »Fimm-Klubbin«, har »fimmarnir« frá kl. 5—6 hvønn mánadag, týsdag og hósdag kunnu leita inn at fáa sær ein øl av tí sterkara slagnum.

Klubbin hevur ikki alla sína tíð verið mannfólkaklubbi, har kvinnurnar einans vóru bodnar við til veitslur sum gestir. Minni enn so. Bert eini tíggju ár frá tí, at táverandi »nýggju klubba-húsini« vóru bygd, høvdu konufólkini fingið fótafesti í mannfólkaborgini: Lógir Klubbans frá 1891 vita at siga, at »extraordinære Medlemmer, Damer, der betaler et aarligt Kontingent af 2 Kr.«, kunnu takast upp sum limir. Og so chevaleresk vóru mannfólkini tá, at tey lótu konufólkini sjálvi ráða sínum klubbaviðurskiftum. . . . »Optagelse af Damer som extraordinære Medlemmer, eller Besøgende, afgøres af den af Da-merne valgte Bestyrelse, der bestaar af 3 Medlemmer. . . .« Tó varð varliga (!) lagt aftrat, at »denne Bestyrelse afgjør de af Damerne alene vedrørende Sager. . . . « Og damurnar hvødu einans loyvi at vitja í Klubbanum 2 ferðir um mánaðin!
Men alt fær ein enda — gerðabókin frá aðalfundi í apríl 1920 lýsir, at summi av mannfólk-unum — við nevndini á odda — nú tykjast bera ótta fyri, at »kvinnuræðið« fer at vinda uppá seg. Gerðabókin frá 25. apríl 1920 sigur:
»Paa Grund af, at Klubben er meget besøgt af Damer, fremkom følgende Forslag fra Besty-relsen:
»Der maa ikke medtages Damer i Klubben, uden ved Klubbens festlige Lejligheder«. Upp-skotið varð kortini felt við 29 ímóti og einans 12 fyri. — Eitt annað — heldur enn ikki ber-søgið! — uppskot, frá aðalfundaluttakara, fekk uppaftur vánaligari lagnu. Tað ljóðaði:
»Generalforsamlingen udtaler, at Bestyrelsen, som hidtil bør paase, at Medlemmerne i Klubben

med Hensyn til Indførelse af Damer i Klubben opfører sig efter Sømmelighedens Fordringer, og i Tilfælde af at et Medlem opfører sig usømmeligt, da skal foreslaa vedkommende exkluderet«. — Teir »sømmelige« limirnir feldu hetta uppskot við 22—6!. . . .

Tað eydnaðist ikki á hesum sinni at forfjóna »la belle femme«, kvinnu-forsprákararnir vóru ov sterkir. Seinni sæst ikki, at nøkur beinleiðis aðalfundaravgerð er tikin um at strika kvinnulimaskapin, men lógirnar eru sum kunnugt fleiri ferðir síðani broyttar — og í teimum broyttu lógunum sæst heldur einki til, at tær hava varðveitt serrættindi teirra frá 1891. . . .

Hvussu er ella ikki, so munnu damurnar í Havnar Klubba eisini í dag kenna seg eins væl-komnar í veitslulag og tá — seyðarhøvdaveitslan undantikin!! Hon er — um hon ikki altíð hevur verið tað — nú so avgjørt tabu, mannfólkasamkoman við lít; so kann hvør einstakur meta um, annaðhvørt tað er »for better or worse« .... Tað var Johs. Djurhuus apotekari, sum fekk seyðarhøvdaveitslurnar í fasta legu, hin fyrsta mundi vera 20. oktober 1929.

Havnar Bio er partur av Klubbanum, sum hoyrir nýggjaru tíðini til, men kortini er vorðin ein institutión, um so kann vera tikið til, so nær knýtt at sjálvum Klubbanum, at bæði eldri og yngri klubbalimir vildu hildið tað verið óhugsandi, um bio og Klubbin ikki framvegis vóru eitt. Eldri klubbalimir vilja minnast, at bioloyvið fekk Klubbin sær, tá ið spiritussølan, ið hevði veitt Klubbanum inntøkur, fall burt. Filmframvísingarnar byrjaðu í Havnar Bio í 1923; fyri at gera tað meiri rúmligt hjá limunum í sjálvum Klubbanum — og eisini fyri at eftirlíka teimum krøvum, sum biovitjandi mugu eiga rætt at seta fram — varð í juni 1959 samtykt at fara undir at reisa nýggja biohøll, á økinum sunnanfyri klubbahúsini, har »Sloans hús« stóðu, til tey vórðu tikin niður at veita pláss fyri einum nýggjum, tíðarhóskandi Havnar Bio; rúm er í salinum fyri um 250 áskoðarum.



*Eldur kom í Klubban í juni 1940: tað logar í ovaru hædd, og tjúkkur roykur kemur upp úr tekjuni*

Ein dapur dagur í søgu Havnar Klubba var, tá ið eldur kom í Klubban, fríggjadagin 28. juni 1940. Tíbetur hendi ikki tann stórskaði, ið ein kundi bera ótta fyri fór at verða.
Klubbalimir vóru annars longu tá fyri ein part útihýstir úr Klubbanum: aftaná eingilsku hersetingina 13. apríl 1940 varð Klubbin sama dag tikin av hervaldinum (Royal Marines) til bústað fyri yvirmenn og sum lazaret — tó bert ovara hæddin. Á nevndarfundi 17. apríl varð avgerð tikin um at leiga hervaldinum klubban fyri £ 35 um.mánaðin, tó so at biografhøllin og barrin ikki vóru uppi í. Klubbalimir kundu sostatt framvegis nýta barrina, men skuldu vísa vaktarmonnunum kort — militer-pass — sum legitimatión, at teir vóru »Members of Thorshavn Club«, hvørja ferð inn varð farið. Men veruligi húsbóndin var um hetta mundið fyrsti heryvirmaðurin, ið kom til Føroya, T. B. W. Sandall oberstur.
Tá ið eldurin íkom 28. juni, var liðið út á dagin. Klokkan var farin av fýra, tá ið fólk vardu eldin í norðara enda av ovaru hædd. Skjótt komu sløkkilið og sjálvbodnir á staðið og fóru beinanvegin undir sløkkingararbeiðið. Tað eydnaðist at basa eldinum eini trý korter aftaná at hann var íkomin, men tá var nógv forkomið í erva, meðan afturfyri niðaru hæddirnar sluppu undan og vóru at kalla óskalaðar.
Hervaldið hevði fingið sær onnur høli, tá ið Klubbin varð afturgjørdur, og limirnir fingu av nýggjum innivist í øllum húsunum.

Føðingardagur Havnar Klubba er 27. oktober og í 175 árinum fellur døgurðaveitslan 26. oktober væl saman við sjálvan føðingardagin aftaná midnátt. Tó, føðingardagsveitslurnar hava verið hildnar ymsar dagar í oktober gjøgnum árini: T. d. í 1927 tann 8. oktober: døgurði, vín, tubbak o. s. fr.: kr. 6 fyri hvønn! I 1910: kr. 2 .... (tá hevði klubbin spiritus-sølu og kundi á tann hátt vinna nakað afturfyri hitt lága atgongugjaldið!)
Annars kann verða víst til, at Klubbin altíð »suverænt« hevur gjørt av, nær hann boðaði limum sínum til samkomu: tað gav at bíta, tá ið jólaveitslan í 1927 varð hildin 17. mars 1928 og »Thorshavns Klubs Julebal« 1926 fyrst varð fingið frá hondum 18. apríl 1927! Tó, her er at skila til, at ..tá høvdu teir skoytt páskaveitslu uppí....



*Hugnaligt var við veitsluborðhaldi í gamla Klubba, seinat í 1950'unum*



*Klubbaútferð í 1956 –*
*mangar hugnaligar løtur hava limirnir havt í gahanum á sumri*

# Smábrot úr klubbasøguni frá 1892

Her skulu verða tikin fram smábrot úr klubbasøguni frá 1892 fram til dagin í dag, í tíðarskeiði, sum ikki er stórvegis umrøtt aðrastaðni, eftir frásøgnum í nevndargerðabókum klubbans:

1892, nevndin verður heimilað »at opføre en Tilbygning til klubbygningen imod Nord til et Beløb af 4.500 Kr. til Teaterbrug«.

1899, 13. februar varð samtykt at taka upp »dansende medlemmer«, ungfólk ið kundu sleppa at verða við á veitslum Klubbans. Men seinni varð dansilimaskapurin avtikin aftur.

1904, hetta ár varð manligur vertur settur at koma ístaðin fyri hin kvinnuliga gjøgnum mong ár, Ellen Poulsen, sum fekk játtað 100 kr. um árið i eftirløn.

1907, Klubbin hevur fingið »Grammophon«. Nevndarsamtykt frá 15. apríl: Det vedtoges at benytte Grammophonen paa følgende Maade: Første Lørdag Aften i hver Maaned, saafremt Medlemmerne ønsker det, samt naar Medlemmer indenfor Klubben tilkendegiver sig overfor en Mand, der har Kendskab til Grammophonen. Der erlægges en Betaling af 5 Øre pr. Nr.

1907, kunngerð í talvuni 30. desember: Da der i den senere Tid stadig forsvinder Aviser, har man vedtaget følgende: 1. At intet Medlem maa medtage Aviser fra Klubbens Lokaler i ordinær Klubtid. 2. Hvis et Medlem ønsker nogen Blade med hjem, sent en Aften, kan dette tillades, men disse maa blive tilbageleveret i Klubben, saasnart denne bliver aaben igen den følgende Dag.

1908, á nevndarfundi 14. apríl varð samtykt at hækka brennivínsprísirnar: Paa Grund af toldforhøjelser vedtages følgende Prisstigninger:

1 Bitter, lille, fra 8 til 10 Øre, en stor fra 16 til 20 Øre, 1 Cognac, lille, fra 10 til 12 Øre, en stor fra 20 til 24 Øre, 1 Genever, lille, fra 8 til 10 Øre, en stor, fra 16 til 20 Øre, 1 Akvavit, lille, fra 5 til 7 Øre, en stor, fra 10 til 14 Øre, 1 Whisky, lille, fra 12 til 14 Øre, en stor, fra 24 til 28 Øre.

1910, 27. mars, soljóðandi nevndarsamtykt: Det vedtoges, at Værten skal være pligtig at servere Smørrebrød med Tilbehør, naar dette af Klubbens Medlemmer maatte forlanges, og skal den Fortjeneste, der heraf falder, være Værtens egen.

1910, 23. juli: Det vedtoges med Opslag i Klubben at henstille til Medlemmerne om ikke at medtage Damer i Klubben udenfor de fastsatte Festaftener, grundet paa en Del af Klubmedlemmernes Misfornøjelse.

1915, 18. november: Vedtaget at anbringe 2 Sofaer i Barren, den ene specielt for N.N. at »detta av í«.

1916, 30. oktober, kom klaga frá klubbalimi um óhampuligan atburð: En fra et Medlem modtagen Skrivelse bringes til Bestyrelsens Kendskab, at han den 28. ds. i Tiden fra Kl. 9—1 Aften har været Genstand for en ret enestaaende Opførsel fra nogle Klubmedlemmers Side, idet han, der havde henlagt en Hat fyldt med Vs Kg Æbler og Vá Kg Valnødder i Klubværelse Nr. 3 paa en derværende Etagere, gjorde den ubehagelige Opdagelse ved 1-Tiden, da han skulle hente sin Hat, at Indholdet var spist og Skallerne lagt i Stedet. Han beklager sig over, at sligt kan finde Sted i Thorshavns Klub, og han haaber at Bestyrelsen vil træffe Foranstaltninger til at fjerne slige Medlemmer, idet han dog er villig til for sit vedkommende.at lade Sagen falde, hvis det eller de Medlemmer, der sáaledes har fornærmet og saaret ham, giver ham en uforbeholden Undskyldning. — Funnið varð fram til hin seka, sum gav ta ynsktu umbering og fekk eina ávaring.

1918, 18. februar, avger nevndin at taka »et Veksel-laan paa Kr. 7000 i Anledning af at Bestyrelsen havde gjort et storre Indkøb af Spirituosa i Leith, og Pengene maa betales forud.«

1950, 26. mars, var á nevndarfundi til umrøðu at



*Stovan í ovastu hædd í nýggja Kluhba, við horni av barrini*

leggja eina hædd omaná »Sloans hús« og innrætta hesi til ein intiman klubb (!). Nevndin vísti uppskotinum, sum klubbalimur var komin við, frá sær, tí at tað liggur uttanfyri endamál klubbans at reka ein tilíkan »intiman« klubba.

1959, 2. juni, endalig samtykt at fara undir byggjan av nýggjari biohøll eftir tekning frá Olaf Mortensen.

1959, 27. oktober, Havnar Klubbi verður 160 ár og gevur út veitslurit. 1 sambandi við hátíðardagin var skip-að fyri reseptión og stór veitsla verður hildin, men ikki sjálvan dagin.

1964, 9. apríl samtykti nevndin at senda fyrispurning til býráðið viðvíkjandi tilmæli av byggiloyvi vestureftir.

1964, 27. oktober, klubbin verður 165 ár, reseptión verður hildin og um kvøldið samkoma við smurdum breyði.

1966, 5. januar, samtykti nevndin at seta seg í samband við Landsbyggifelagið viðvíkjandi detailprojektering av nýggjum klubba, sum Peter Skovsgaard hevði gjørt tekning til.

1966, 12.september, samtykti nevndin at bjóða limunum at tekna brævalán til at fáa pening tilvega til byggjan av nýggjum klubbahúsi (til 7½ % p.a.).

1967, 9. februar samtykti nevndin at taka við tilboði uppá nýggjan klubba frá byggifelagnum Danberg og Joensen, uppá 732.021,00 kr. og fyribils sáttmáli varð undirskrivaður. Nýbygningurin skal vera í 3 hæddum og kjallara á øki klubbans. Landsbyggifelagið skal hava eftirlit við byggingini.

1968, 11. juli varð nýggi klubbin reistur.

1971, 31. januar var aðalfundur um rúsdrekka og ølmál. Álagt verður nevndini at skipa fyri allari øl- og



Tá ið nýggi Klubbin varð reistur í juli 1968



*Billardspælarar hava egið høli í Klubhanum*

rúsdrekkaúrskeinking í klubbanum aftaná skrivliga atkvøðu. 130 limir vóru møttir, 109 atkvøddu ja, 18 nei og 3 atkvøðuseðlar vóru blankir.

1971, 24. januar var nevndarfundur og avgjørt var, at diskotekklubbi skal hava loyvi til dans í klubbanum 2 ferðir um vikuna.

1971, 28. mars var vanligur aðalfundur, har uppskot kom fram um ikki at hava go-go í diskotekklubbanum. Formaðurin segði, at go-go kom ikki at halda fram.

1971, 29. desember, regluligur aðalfundur. Formaðurin greiddi frá, at barrin í nýggja klubba var tikin í nýtslu og nýggir møblar komnir.

Hann greiddi síðani frá, at samsvarandi aðalfundaravgerð var samtykt gjørd fyri 300 ára stovningargrunn Havnar Klubba, á tann hátt, at 3000 kr. vóru settar á bundna konto í Sjóvinnubankanum til hægstu innláns-rentu og skal peningurin ikki kunna takast út aftur fyrr enn á 300 ára stovningardegi klubbans, 27. oktober ár 2099. Tilskrivað renta skal heldur ikki kunna takast út fyrr enn á nevnda degi, men skal tilskrivast innskots-kapitalinum. Um 127 ár vildi hesin peningur við tí rentusatsi, ið er í dag, geva kr. 32.191.258,82, sum »má haldast vera ein tolulig føðingardagsgáva«. Um klubbin skuldi hildið uppat og verið niðurlagdur áðrenn 27. ok-tobir 2099, skal peningurin nýtast til samfelagsgott cnda-mál eftir avgerð av nevndini.

1972, 15. mars avgjørdi nevndin at hava reyðugildi 18. mars — nýggjur táttur í klubbalívinum. Til hetta gildi komu umleið 180 fólk, nýttar vóru 11 x 12 fløskur av hvittvíni og 7 x 10 kg av reyðum, umframt latnar vórðu til barrina 22 fløskur av gin og 4 fløskur av snapsi.

1972, 29. mars samtykti nevndin at keypa nýtt billardborð fyri umleið 14.000 kr.



*Barrin í dag í ovastu hædd í Klubbanum*

1973, 24. oktober var nevndarfundur, har samtykt varð at royna at skipa fyri fundi um rúsdrekkamálið. Hesin fundur var so 5. november, har løgtings- og býráðslimir eftir innbjóðing vóru komnir til staðar saman við umboði fyri løgregluna at greiða frá støðu teirra til fólkaatkvøðuna um rúsdrekkalóggávuna, ið vera skuldi 7. november.

1974, 29. mai hevði nevndin fund um komandi veitslu-hald í samband við 175 ára stovningardag klubbans 27. oktober og útgávu av veitsluriti og veitslu-sanghefti. Samtykt varð at lata myndir Chr. Holm Isaksens úr gamla teatersalinum uppfríska.

— Nú í 175 árinum hevur nevnd Havnar Klubba avgjørt, á fundi í august, at taka fyrsta stig fyri møguligari útbyggjan av Klubbanum og velja eina arbeiðsnevnd við hesum í hyggju. Tað er tann partur av Gamla Klubba, ið stendur eftir, við barrini í neðra og Kongasalinum í erva, sum ætlanin er at taka niður og byggja av nýggjum uppí syðra endan av Nýggja Klubba. Hetta verður stórt peningatiltak at fremja, men klubbalimir hava áður víst, at teir ikki eru ræddir at veita eina hjálpandi hond peningaliga, tá ið hetta gerst neyðugt: brævalánið, tá ið farið var undir stórbyggingina í 1967.
Við tí støðugt vaksandi limatali er longu vorðið ov trongt í Klubbanum, og eingin ivi er um, at limirnir vilja heilsa einari útbyggjan vælkomnari. Nær so kann verða farið undir slíkt tiltak er ein økonomiskur spurningur fremst av øllum. Livst so spyrst.



*Borðreitt er til døgurðaveitslu í nýggia Klubba*

## FORMENN Í HAVNAR KLUBBA 1891-1974



*O. P. Effersøe*



*R. Andersen*



*S. E. Müller*



*A. Degn*



*M. A. Winther*



*M. Jacobsen*



*H. C. Andreasen*



*P. Kjelnæs*



*Jens Evensen*



Johan Evensen



H. C. W. Tórgarð



Júst Jacobsen



Johan Danielsen



Hjalmar Heerup



Johs. Djurhuus



P. S. Hansen



H. A. Djurhuus



Poul Müller



*Knud Lambaa*



*J. Veyhe*



*W. Petersen*



*C. F. Hansen*



*V. Christiansen*



*Ebbe Müller*



*J. P. Ellendersen*



*Carl Herup Olsen*



*Debes Christiansen*

NÚSITANDI NEVND:

Debes Christiansen, Jens Pauli Ellendersen, Havgrímur Johannessen, Børge Egholm, Jógvan (Ki) Jacobsen.

SKRIVARAR:
Poul Johannessen, Meinhard Jacobsen, Jacob Mouritsen, Sam Olsen, Just Jacobsen, C. F. Hansen, Jacob Baia, Heri Mohr, Chr. Dahl-Christiansen.

VERTAR:

Ellen Poulsen, Jacob Michael Michelsen, Andreas Jensen, Djone Weihe, Christian Jensen, Andreas Joensen, Mourits Simonsen, Jákup Simonsen.

HEIÐURSLIMIR 1974:
Knud Lambaa, Edward Samuelsen, Martin Djurhuus, Otto Bech, Jacob Veyhe, Johan Schrøter, Johs. Olsen.

LIMATAL 1974:
255 innanbíggja, 65 uttanbíggja limir.

RITSTJÓRI: *EIDEN MÜLLER*
MYNDIR (NÝGGJARI): *LÜTZEN FOTO OG GRAFIA*
KLISJEIR: *GRAFIA*
HEFTING: *HELGI JUSTINUSSEN*
PRENT: *DIMMALÆTTING*
*NEVND HAVNAR KLUBBA GAV ÚT OKTOBER 1974*



Prent; *Dimmalætting*